Fríggjadag 13. kl. 14.20

Det skæve skib
Lasse Spang Olsen filmar Flying Enterprise. Tað eru 50 ár liðin, síðani Henrik Kurt Carlsen gjørdist heimsgitin, tá hann ikki vildi av søkkandi skipi sínum. Skipið sakk, men nú 50 ár seinni verður mytan endurvakt.

Fríggjadag 13. kl. 20.25

Okkara kokkar
Vitjað verður á rækjuvirkinum á Oyri, har vit síggja, hvussu rækjurnar verða hagreiddar og pakkaðar. Síðani gera kokkarnir 4 ymiskar kaldar og heitar rættir við rækjum og jákupsskeljum og øllum góðum, sum hoyrir til.

Fríggjadag 13. kl. 19.00

Next game
Hvørja viku ummælir Jason Watt hópin av telduspølum, sum eru frammi á marknaðinum.Hesa ferð er tað serliga útgávan hjá Sony, The Gateway, sum fær umrøu, men hugt verður eisini at øðrum spølum.

Fríggjadag 13. kl. 24.00



The Actors Studio: Kevin Costner
Seinastu góðu tíggju árini hevur Kevin Costner verið roknaður millum heimsins bestu filmssjónleikarar. Í hesi dokumentarsendingini sigur Costner sjálvur frá lívi sínum.

Leygardag 14. kl. 02.35

AIDS: Millum lív og deyða
Dokumentarsending um AIDS-umferðina í Afrika, sum framvegis er ein stórur spurningur hjá granskarum. Hvussu ber tað til, at ein bólkur av menniskjum verður raktur fyrra ferðir harðari av sjúkuni enn onnur?

Leygardag 14. kl. 18.40

Ronja Ránsmansdóttir
Ronja býr á Mattisslottinum í Ævintýraskóginum saman við mammuni, pápanum og øllum Mattis-ránsmonnunum. Ronja og pápin elska bæði hvørt annað, men ein dagin hittir Ronja Birk, sum er sonur arvafíggindan hjá pápanum.

Leygardag 14. kl. 22.00



Rættarmedisinararnir
Ein dugnaligur líksýnsmaður kann fáa neyðugu upplýsingarnar um eina brotsgerð fram, meðan ein vánaligur kann gera júst tað øvugta. Tveir líksýnsmenn siga frá veruleikanum.

Leygardag 14. kl. 23.45

Tann seinasti Morse – um Morse
Minningarsending um Morse, sum er tann best umtókti sjónvarpsdetektivurin í 90'unum. Tann tilkomni, gríski, øldrekkandi Wagnerelskarin Inspector Morse doyði í seinastu sendingini um Morse.

Sunnudag 15. kl. 13.55



Premier League: Tottenham-Arsenal
Undir Glenn Hoddle tykist Tottnham loksins vera í ferð við at byggja eitt sterkt lið. Sunnudagin hava teir stóra uppgávu, tá meistararnir úr Arsenal koma á vitjan í slagnum um London.

Sunnudag 15. kl. 18.25

Jólamaðurin og reinsdjórini
Tað er jólaaftan og allir jólamenn hava úr at gera. Men tá jólamaðurin skal fara avstað, eru reinsdjórini, sum draga sletuna, horvin.
Nú er ringt lag. Men beint sum hann sær øll tey vónskviknu barnaandlitini fyri sær, kemur ein fuglur flúgvandi við onkrum í nevinum.

Sunnudag 15. kl. 20.00

Oliver Twist
Oliver verður borin í heim í Norðuronglandi í 1825, men mamma hansara doyr í barsulssongini. Tiskil veksur Oliver upp á barnaheimi, og í filminum síggja vit, hvussu uppvøkstur hansara er í klassauppbýtta Onglandi í 19. øld.

Sunnudag 15. kl. 21.45

Gloym meg ei
Øll kunnu gloyma, men Diane McGowin, sum er sakførari í bestu árum, undrar seg um, hvussu gloymsk hon er vorðin í seinastuni. Tá hon at enda fer til lækna, fær hon at vita, at hon hevur Alzheimersjúkuna. Filmurin er óhóskandi fyri smábørn.

Mánadag 16. kl. 09.00

Ein heimur úr ísi
Í hesi dokumentarsendiroðinin síggja vit, hvussu heimurin á pólunum sær út. Ein heimur, har lív sum vit kenna tað, valla fær verið til.

Mánadag 16. kl. 18.25

Miðlingurin Malcolm
Miðlingurin Malcolm 34
Vinkona Malcolm, Cynthia, sum eisini gongur í serflokkinum, vil hava fleiri vinir, og tí bjóðar hon einum hópi av fólki í veitslu. Men Malcolm veit av royndum, at hinir næmingarnir í skúlanum bara flenna at Krelboyne-næmingum.

Mánadag 16. kl. 19.55

Marilyn vs. Marilyn
Øðrvísi myndirnar, sum Milton Greene, tók av Marilyn Monroe gav henni nýtt áræði til at taka ábyrgd av lívi sínum.

Mánadag 16. kl. 21.15

Morð millum vinir
Alex, David og Juliet leita eftir einum nýggjum vinfólki til íbúð sína. Valið fellur á Hugo, men tá hann stutt eftir hetta verður funnin deyður av eini yvirdosis, kemur vinarlagið hjá hinum trimum av álvara at standa sína roynd.

Týsdag 17. kl. 17.40



Hetjur í havinum
Fransisco Ferrera og Umberto Pelizzari teljast millum dugnaligastu kavararnar í heiminum. Í hesi dokumentarsendingini bjóða teir hvørjum øðrum av, tá tað ræður um at gera vandamikil ting í dýpinum.

Týsdag 17. kl. 18.00



Jólalalund
Jólalalund 9
Uha, man tað vera loynivinurin, sum er komin at vitja?? Nei, tað er jólamaðurin, ein evarska lítil jólamaður, ið ljóðar akkurát sum Olgar. Jólamaðurin sigur, at Angela fær onga jólagávu í ár, man tað passa? Og so er tað, um tað eydnast at fáa lúkuna upp!

Týsdag 17. kl. 19.30

Teir tríggir musketerarnir
Charlie Sheen, Kiefer Sutherland, Chris O'Donnel og Rebecca De Mornay hava høvuðsleiklutirnir í hesi útgávuni av klassisku søguni hjá Alexandre Duma.

Týsdag 17. kl. 21.35

Deyðin í Venezia
Tá Aschenbach gerst bergtikin í Tadzio, fer hann mest sum at forfylgja unga manninum, men sum frálíður gerst kenslan við hesum alt meira pínufull. Luchino Visconti fekk í 1971 serliga virðisløn fyri hendan filmin.

Mikudag 18. kl. 02.55

Hellgate Bridge
Ein amerikonsk hereind undir leiðslu av Whittlesey majori er kringsett av týskum hermonnum í Argonne skóginum. Frá týskarunum fáa teir tvinnar møguleikar, at geva seg ella doyggja, men kanska er ein triði møguleiki eisini.

Mikudag 18. kl. 18.30

Rabatten
Henrik Dahl pruttar um prísirnar og gevur kontant brúkaratips til alt húskið. Hvussu kann tað løna seg at keypa brúkt og hvørjar eru biligar uttanlands. Og hvussu gert tú, tá tú skalt hava hvítivørur á biligasta hátt.

Mikudag 18. kl. 20.00

Undan væðingini
Undan væðingini:
Jólagestir frammi við Gjónna Zacharias Hammer hevur gjørt sendingina, sum verður send mikukvøldið. Zacharias brókti bóndahúsini frammi við Gjónna til sjónvarpsstovu og samstundis fekk hann sær eitt prát við fólk, sum høvðu tilknýti til húsini.

Mikudag 18. kl. 20.00



Real Madrid-FIFA All Stars
Beinleiðis av Santiago Bernabeu í Madrid. Spanska stórfelagið, Real Madrid, fyllir 100, og millum annað verður hetta feirað við einum dysti millum stjørnurnar hjá Real Madrid og restina av heiminum. Á mótstøðuliðnum eru millum annað Beckham, Rivaldo, Ballack og Kahn.

Hósdag 19. kl. 20.00

Sleepless in Seattle
Eftir at kona hansara er deyð av krabba,m flytir Sam Baldwin til Seattle við átta ára gamla soni sínum, Jonah. og uttan at Sam veit tað, fær Jonah sett nýtt lív í tilveruna hjá Sam, tá hann ringir til eina lurtarasending í útvarpinum.

Hósdag 19. kl. 22.25



Krimitímin: Eitt mál fyri Frost 2:2
Allir starvsfelagarnir eru firtnir inn á Frost, tí hann hevur handtikið løgreglumannin Newcombe fyri morðið á starvsfelagan Tim Fox. Men Frost hevur fingið annað at hugsa um.

Hósdag 19. kl. 23.30



Ringanna harri
Mikudagin varð annar parturin í trilogiini um Ringanna Harra frumsýndur. Eins og í fjør hevur DR gjørt eina sending, sum snýr seg um heimskenda ævintýrið hjá Tolkien.

Hósdag 19. kl. 23.40

J.K. Rowling – Harry Potter og eg
135 milliónir Harry Potter bøkur á 48 málum eru seldar higartil. Søgan um J. K. Rowling er eisini ævintýrkend og í sendingini, sigur hon frá um seg sjálva.

Leygardag 14. kl. 19.05

Á Vaglinum
Á Vaglinum er spurnarkapping millum løgtingslimir og hesuferð hittast Edmund Joensen og Hendrik Old, ið skulu dystast ímóti Heina O. Heinesen og Jógvani á Lakjuni.
Kappingin er skipað við eitt nú spurningum úr føroyskari náttúru, skipasøgu, byggilist og tónleiki. Harumframt eru aðrar kappingar, so sum Røðan og Avbjóðingin, har veljast kann millum Svervektarin og Musikalsku avbjóðingina.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

Sunnudagur 15. kl. 14.15

Fram við ánni
Fram við ánni
Teir umleið 7000 bretsku hermennirnir, sum vóru í Vágum, høvdu stóra ávirkan á Vágar bæði undir krígnum og eftir kríggið. Enn dagin í dag eru sporini sjónsk, men um at farast. Vitjað verður í Vatnsoyrum, har Karl Johan Nielsen greiðir frá lívinum fram við Sjatlá.

Mikudagur 18. kl. 19.30

Fólk og frítíð
11. august vóru 30 ár liðin síðani Hjørleif Waag Høgnesen tók við sum organistur í Christianskirkjuni og 1. sunnudag í advent varð gjørt vart við dagin, eitt nú við sømdargávu frá kirkjuráðnum. Vit skifta orð við Hjørleif um starvið sum urguleikari, og nær, hví og hvussu áhugin er íkomin. Eisini hoyra vit brot við sálmasangi og urguspæli, eins og nomið verður við jólini. Systrarnar Guðrið, Mása og Astrid Tróndheim hava altíð sungið. Vit skifta orð við tvær teirra, Másu og Astrid, sum harumframt eisini fara at syngja nakrar jólasangir.
Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

MORGUNLESTRAR

í ÚF 16. - 21. desember
Ámundur Berthelsen á Strondum lesur

Mánadagin 16. desember
nr. 115 Alfaðirs eygu jarðarríki skoða
nr. 117 O, sigursæla náttarstund í forðum

Týsdagin 17. desember
nr. 118 Heilaga stund, tú á fold vára dalað ert niður
nr. 119 Guðs einglar nú syngja við gleði og gleim

Mikudagin 18. desember
nr. 113 Føgur var náttin við blaktrandi stjørnum í forðum

Hósdagin 19. desember
nr. 106 Her koma, Jesus, tíni smá

Fríggjadagin 20. desember
nr. 105 Jól hava eingaljóð
nr. 127 Til okkum her á lágum støðum

Leygardagur 21. desember
nr. 280 Nú frøi seg hvør kristin sál

Ítróttur

3+
Leygardagin kl. 14.00
Tipslørdag

Canal+
Leygardagin kl. 14.55
Premier League, beinleiðis

Sunnudagin kl. 0.30
NHL: Detroit-Columbus
Sunnudagin kl. 13.55
Premier League: Tottenham-Arsenal

Sunnudagin kl. 15.55
Premier League: Sunderland-Liverpool

Mánadagin kl. 19.30
Kick Off: Fótbóltur frá vikuskiftinum

Mánadagin kl. 19.55
Premier League: Bolton-Leeds

Hósdagin kl. 0.30
NHL: New Jersey-Ottawa

Canal+ blá
Leygardagin kl. 19.25
Seria A, beinleiðis

Sunnudagin kl. 19.25
Seria A, beinleiðis

TV2 Zulu
Sunnudagin kl. 06.55
EM-hondbóltur, hálvfinala

Sunnudagin kl. 08.35
EM-hondbóltur, hálvfinala

Sunnudagin kl. 21.05
NFL: NFL: San Francisco 49ers-Green Bay Packers

Mánadagin kl. 12.05
EM-hondbóltur, finalan

TVDanmark1
Leygardagin kl. 01.30
Fight Night: Evander Holyfiled-Chris Byrd

Leygardagin kl. 14.25
Bundesliga: Bayern München-Schalke 04

Sunnudagin kl. 16.25
Bundesliga: Wolfsburg-Stuttgart

Sunnudagin kl. 23.55
Bundesligan

Mánadagin kl. 21.00
Anpfiff

Beinleiðis á Eurosport hesa vikuna
WC skíðskjóting úr Pokljuka, Slovenia

WC skíðrenning úr Val d'Isere, Fraklandi

Fótbóltur, UEFA-Cup

Fótbóltur, African Champions League

WC bobsleðu úr Cortina d'Ampezzo, Italia

WC langrenn úr Val di Fiemme í Italia

WC skíðlop úr Neustadt, Týsklandi

EM-svimjing úr Riesa, Týsklandi

EM-curling úr Grindelwald í Sveis

WC Nordic kombinerað úr Harrachov, Kekkia

Flogbóltur Champions League

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Layout: Team 85
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin